# Bárður dagsins maður

*Flogbóltur: Havnarmaðurin Bárður Mikkelsen fekk heiðurin at verða kosin dagsins maður eftir dystin móti Skovbakken, tá Fortuna vann 2-1. Tað er fyrstu ferð í ár Forutna vinnur á Skovbakken*

Sveinur Tróndarson

Tað gongur misjavnt á hjá føroyingunum í donsku flogbóltskappingini.

Bárður Mikkelsen og Fortuna spældu tveir dystir um vikuskiftið. Teir vunnu tann fyrra móti Skovbakken, men taptu tann seinna móti Lyngby.

### Dagsins maður

Í fyrra dystinum var spenningur. Fortuna hevði tapt báðar undanfarnu dystirnar móti Skovbakken í hesum kappingarárinum og tí var lagt upp til, at teir hesaferð skuldu vinna. Tað eydnaðist, men tað var eftir tógvið stríð og ein sera spennandi dyst.

Byrjanin var ikki serliga góða hjá Fortuna. Ein av bestu leikarunum hjá Fortunu var ov seinur til bussin og var tí ikki við í fyrra hálvleiki og tað sást eftir øllum at døma á spælinum. Skovbakken vann fyrsta sett 21-18. Annað sett setti Skovbakken ferðina enn meira upp og tá klárði Fortuna als ikki at fylgja við. Teir taptu settið 13-21 og tað sá út til at fara at ganga sum í dystunum frammanundan.

Men burturvilsti maðurin hevði sjálvur funnið vegin til Århus og longu í triðja settið spurdist úrslit burtur úr tí. Fortuna vann 21-9 og hevði nú fingið vónina aftur. Men tað var stokkutur hiti. Skovbakken menti seg aftur og vann fjórða sett 21-18.

Hóast tað nú sá út til at Skovbakken hevði fingið fótin fyri seg eydnaðist tað Fortunu at venda skútuni enn einaferð og teir vunnu lítla javnbrótaran 9-7 og fingu tí javna til 1-1. Í seinasta javnbrótaranum um dystin var tað Fortuna, sum var omaná. Teir vunnu hann 15-7 og harvið dystin 2-1.

Eftir dystin var Bárður Mikkelsen valdur til dagsins leikara, men sigurin hjálpti ikki sunnudagin, tí tá tapti Fortuna greitt 2-0 móti Lyngby.

### TV55 niðast

Hjá TV55 gongur ongan veg. Annika Joensen og Alvilda Ólavsdóttir eru við í hópinum hjá liðnum úr Keypmannahavn, men tað er synd at siga, at tað gongur væl í hond hjá teimum. Tá innleiðandi kappingin var av lógu tær á næstaftasta plássið og nú tveir dystir eru leiktir í endaumfarinum eru tær niðast.

Sunnudagin spældu tær móti HIK Ålborg og tann dystin taptu tær 2-1.

Tó so, tað bilar ikki stórvegis um liðini tapa, tí eingin flytir niður úr bestu deildini. Kappingin verður víðka næsta ár og tí flyta tvey lið upp og einki niður.

ASV Århus, sum eisini eru í sama bólki, sum TV55 hevur Juanu Joensen á liðnum, og hjá teimum gongur heldur betri. Tær hava spælt tveir dystir í endaumfarinum og vunnið báðar. Tann fyrra móti HIK Ålborg 2-1 og tann seinna 2-0 móti Skt. Jørgens.

Gudrid Nolsøe og hinar Fortunakvinnurnar høvdu frí um vikuskftið. Næsti dysturin hjá teimum verður týskvøldið, tá tær skulu spæla lokaluppgerð móti hinum Odenseliðnum í meistaradeildini hjá kvinnum, DHG.

# ÍF vann eitt sett

*Flogbóltur: Tað er sum at vinna ein dyst, at fáa eitt sett frá Mjølnir og tað kláraðu fuglfjarðargentur sunnudagin. Dystin taptu tær ...*

Sveinur Tróndarson

Mjølnir-ÍF 2-0
(21-15, 18-21, 9-7
21-10, 21-4)

Hóast tað var Mjølnir, sum vann dystin móti ÍF í Klaksvík sunnudagin, so kláraðu fuglfjarðarkvinnur at gera tað, sum fá lið hava gjørt undan teimum í ár. Tær vunnu eitt sett móti meistarunum.

### Mundi eydnast

Eftir tí, sum vit hava frætt úr Klaksvík, so var ikki talan um ein av teimum vøkru dystunum.

Fyrsta sett tók Mjølnir sær av, og tað var eisini væntandi, at tær fóru at vinna annað sett, men so varð ikki. ÍF fótaði sær betri enn nakran vardi og tá samanumkom hjøvdu tær vunnið annað sett 21-18.

Síðani varð farið í holt við javnbrótaran fyri at finna ein vinnara til fyrra hálvleik. Her leikti javnt á, og heldur ikki tað var eftir "skránni".

Fugfjararkvinnur fingu góða byrjan og hildu tørn. Javnbrótarin er stuttur og tí ræður um ikki at lata hitt liðið sleppa ov langt og ÍF kláraði at halda fast.

Í veruleikanum kláraðu tær at halda so fast, at tær fingu tveir settbóltar, men tíverri fyri tær megnaðu tær ikki at umseta teir og hálvleikssigurin endaði tí í Klaksvík.

### Stórur munur

Í seinna hálvleiki sást betur hvat av liðunum liggur í oddinum og hvat liggur í botninum. Mjølnir hevði fingið fótin fyri seg og tað fingu ÍF-kvinnurnar at kenna.

Triðja settið endaði 21-15 til Mjølnir og hetta vóru greið boð um, at tað sum hendi í fyrra hálvleiki skuldi ikki endurtaka seg, og so var.

Mjølnir setti seg tungt á dystin og fjórða sett var ein avgreiðsluspurningur burturav.

Meistararnir úr Klaksvík vundu burtur úr ÍF, sumvarð sent aftur til hús við einum lemjandi tapi í seinasta settinum sum endaði 21-4.

Tískil vann Mjølnir dystin 2-0 og tað var tað, sum øll høvdu roknað við, men ÍF vann í hvussu er eitt sett frá meistarunum og tfóru tí ikki tómhentar aftur um Leirvíksfjørð.



*Hóast ÍF vann eitt sett í dystinum móti Mjølnir, so var ongantíð ivi um, hvønn veg stigini skudlu fara*

# Fram oman á í Sørvági

*Flogbóltur: SÍ var ov nógv skert tá Fram var á vitjan og tapti dystin greitt*



*Fram var við yvirlutan, tá teir sunnudagin vitjaðu í Sørvági*

Sveinur Tróndarson

SÍ-Fram 0-2
(21-19, 12-21, 3-7
18-21, 19-21)

Fram vann dystin móti SÍ í Sørvági og varðveitti ti trýsti á Mjølnir um silvurmerkini.

Lið sørvinga var skert sunnudagin og tá tikið verður av í betra endanum, so sæst tað aftur á spælinum. Ikki tí, gestirnir vóru eisini munandi skerdir, men teir eru kanska betri fyri tá til stykkis kemur.

### Í tómgongd

Tað var ikki tað vakra spælið, sum sermerkti dystin í Sørvági sunnudagin. Hvørki av liðunum megnaði at vísa tað heilt stóra og tað tyktist heldur ikki at leikararnir vóru serliga uppsettir.

Sørvingar manglaðu tveir lyklaleikarar og høvdu tí torført við at fóta sær. Jón Nielsen, sum hevur verið so nógv tann týdningarmesti leikarin hjá sørvingum, var ikki við og tað var hevarin, Kaj á Stongum, heldur ikki.

Hóast Kaj, í sentimetrum, ikki er ein stórur maður, so hevur hann fingið nógv burturúr, sum hevari í ár, og tað er trupult at koma í hansara stað móti endanum av árinum.

Suni Hansen var við, men einsamallur megnar hann ov lítið til at tað munar.

Tá so móttøkan er av skriðuni er einki at gera.

### Einki upp á seg

Hjá Fram var hetta ein dystur, sum tað snúði seg um at vinna, hava teir ætlanir um at vinna silvuri í ár. Hóast hvørki Magnus Tausen, Dávid Davidsen ella Bernhard Petersen vóru við, so eru Framararnir so væl skipaðir, at teir hava annað fólk at seta ístaðin uttan at tað ávirkar spæli ov nógv.

Sum vit hava skilt, var manningin á Fram liðnum tann yngsta teir nakrantíð hava møtt við og tá teir vunnu, so bilti tað einki.

Við sigrinum sunnudagin helt Fram trýsti á Mjølnir í kappingini um silvurmerkini og tí er enn eitt sindur av spenningi um tað.

Í botninum er eingin spenningur, tí hvørki ÍF ella SÍ, sum liggja lið um lið í botninum flyta niður.



# Dráttur vann aftur á Fleyr

*Flogbóltur: Dráttur vann enn einaferð á Fleyr og hevur tí enn møguleika at gerast nummar tvey, men so skulu tær vinna á TB næsta vikuskiftið*



Sveinur Tróndarson

Dráttur-Fleyr 2-0
(21-17, 21-17
21-10, 21-14)

Fleyr fekk ikki hevnd fyri tapið í hálvfinaluni móti Drátti, tí kvinnurnar úr Vágum gjørdu bart. Tær vunnu dystin sunnudagin greitt.

### Hava mótið enn

Dráttur var sterkara liðið á Giljanesi sunnudagin og tí var ongantíð nakar rættuligur ivi um hvør fór at vinna dystin. Fyrri hálvleikur var nokkso javnur, men kortini var Dráttur klárt tað betra liðið. Fleyr var kanska eisini nakað skert av, at Rúna Hentze ikki var við tí hennara drúgvu royndir telja ikki so lítið fyri hinar leikararnar á liðnum.

Óvæntað var tað harafturímóti ikki at Dráttur vann. Tær hava higartil í ár víst, at tær, tá hugurin er til staðar, kunnu gera seg galdandi í oddinum, men tað krevur so eisini, at tær vinna dystirnar móti liðunum, sum eru undir teimum í stigatalvuni.

Tað er gloppið hjá teimum tvær ferðir í ár, og tað vísir kanska støðuna hjá Drátti sum hon er. Tilfarið er til staðar, men spælið er ikki nóg støðugt til veruliga at kunna gera seg galdandi.

Men tær hava mótið enn, hóast tað verður torført at fáa hendur á silvurmerkjunum. TB liggur best fyri og liðini bæði hittast nevniliga næsta vikuskiftið. Tann dysturin verður samstundis seinasti dysturin hjá Drátti í ár, tí fríggjakvøldið spæla tær móti Mjølnir tann dystin, sum átti at verið leiktur tann dagin steypafinalan er.

Tí vita vit sunnudagin um tað fer at eydnast Drátti at vinna silvurmerkini ella ikki.

### Ringt ár

Hjá Fleyr hevur árið verið serstakliga ringt, tá hugsað verður um úrslitini. Tær hava tapt so nógvar dystir, sum ongantíð fyrr og seinasta vikuskiftið glapp finalusessurin teimum av hondum í steypakappingini.

Tað skal tó sigast teimum til fyrimuns, at tær hava havt torført við at finna rætta fólki í ár, og tað ger truplu uppgávuna enn torførari.

Men soleiðis er ítróttur eisini og tað er einki annað at gera við tað enn at berjast víðari, hóast tað svíður sum svøllur tá tað gongur ímóti.

### Ikki besta útgangsstøði

Nú kappingarárið líður móti endanum hevur Dráttur umframt stríðið um silvurmerkini steypafinaluna móti Mjølnir eftir.

Henda verður, sum áður sagt, leikt 18. marts, men útgangsstøðið hjá Drátti er ikki tað besta. Inntil finaluna mugu tær klára seg uttan Herborg á Mýruni, tí hon er farin lestrarferð. Herborg spælir hevari og tí verður tað torført at klára seg uttan hana.

Kortini er hetta ikki nakað sum hevur verið Drátti ókunnugt, tí tær hava vitað tað leingi og hava tí fyrireikað seg eitt sindur til broytingina.

Um tað so fær ávirkan á spælið í finaluni er ikki gott at vita.

# Alt eftir bókini

*Flogbóltur: Mjølnir avgreiddi dystin móti ÍF eftir bókini. Nú eru eyguni vend móti steypafinaluni móti Fleyr*

Sveinur Tróndarson

Mjølnir-ÍF 2-0
(21-9, 21-6
21-13, 21-16)

Tað gekk skjótt fyri seg, tá Mjølnir og ÍF hittust í Klaksvík sunnudagin.

Mjølnir var alt ov sterkt til at ÍF kundi gera nakað við teir og tí endaði dysturin við greiðum 2-0 sigri til Mjølnir.

### Ikki annað væntandi

Í upptaktini í leygardagsblaðnum skrivaðu vit, at tað neyvan fór at enda við øðrum enn einum sigri til Mjølnir og so var. Í veruleikanum kunnu vit siga, at tað var ikki annað væntandi, tí Mjølnir hevur víst seg at vera rættuliga sterkt í løtuni og tí skuldi okkurt heilt óvæntað henda, um ÍF skuldi megna at vinna dystin.

Tað hjálpti neyvan at ÍF mátti spæla uttan teir báðar, Símun Lassaberg og Bartal Eliasen, sum eru nakrir av teimum mest royndu leikarunum á ÍF liðnum. Í teirra stað var yngri leikari settur, og tað er ikki bara sum at siga tað, at verða tveittur út í ein dyst móti Mjølnir.

Úrslitið var eisini hareftir og ÍF liggur framhaldandi á seinasta plássi saman við sørvingum.

### Steypafinalan fyri framman

Hjá klaksvíkingum er árið ikki burturspilt, verri enn so. Teir hava ikki fingið tað burturúr, sum teir ætlaðu sær, men enn er ein møguleiki eftir og honum fara teir eftir. Verið vís í tí.

Klaksvíkingar hava sett eyguni eftir steypafinaluni og øll orka verður nú brúkt til at fyrireika seg til tann dystin.

Klaksvíkingar høvdu sett nøsina upp eftir at vinna móti havnarmonnum í landskappingini í ár, men tað er enn ikki eydnast teimum. Tí hevur tað nógv at siga fyri teir, at teir klára at koppa Fleyr í steypafinaluni.

Um tað fer at eydnast, fáa vit at síggja ...

# Føroyingar á veg upp í aðru deild

*Flogbóltur: Føroysku útisetarnir, sum spæla við egnum felagi, hava endiliga fótað sær í triðju deild og sum støðan er nú, skal vilja illa til um teir ikki skulu flyta upp í aðru deild*

Sveinur Tróndarson

Føroyskir flogbóltsspælarar trívast í donsku flogbóltskappingini. Fleiri føroyskir útisetar spæla við í bestu donsku deildini, men tað eru ikki allir, sum hava valt ta loysnina.

Hyggja vit eftir leikaralistanum hjá ÍF Føroyum, so er bara talan um »gomul« kend andlit. Alt leikarar, sum hava leikt við Fram og Fleyr í nítiárunum.

### Málið í eygsjón

Sum øll onnur feløg, máttu føroyingarnir byrja í botninum við nýggja liðnum tá teir byrjaðu fyri trimum árum síðani, men tað var mestsum ov lætt. Mótstøðan var ikki stór og tí var kósin sett beint uppeftir.

Tá teir í fjør fluttu upp í triðju deild mettu tey flestu, at nú mundi stígur fara at koma í, tí kappingin í deildunum er munandi harðari enn hon er í seriunum.

Byrjanin gav skeptikarunum rætt, tí tað gekk heldur enn ikki striltið at koma í gongd. Liðið tapti alt ov nógvar dystir og lá ta einu tíðina við einum ávísum likamsluti í vatnskorpuni.

Fyri at venda skeivu gongdini varð Herman Lindberg settur sum venjari og hann mann hava havt okkurt gott at siga ungu monnunum, tí við eitt fór at ganga hinvegin.

### Gingið stútt framá

Síðani hann tók við hevur gingið stútt framá. Dystir, sum fyrr eru taptir verða nú vunnir. Hetta hevur gjørt sítt til, at ÍF Føroyar hevur kropið sær upp eftir stigatalvuni har tað nú er á fjórða plássi.

Av tí at árið í ár er heilt serligt í donskum flogbólti, flyta fimm tey fremstu liðini í triðju deild upp í aðru, og sum støðan er í løtuni eru føroyingarnir næstan tryggir.

ÍF Føroyar liigur á fjórða plássi við 16 stigum. Tvey frammanfyri nummar fimm og fýra frammanfyri nummar seks - og tvey aftanfyri nummar trý. Og tað væntað bert trý umfør í kappingini.

Tað merkir, at vinnur ÍF Føroyar næsta dystin, sum er móti VKV Gladsaxe, so eru teir tryggjaðir uppflyting.

### Góða eydnu

Sum altíð er spurningurin um tað ber til at halda upp á fólki og soleiðis er eisini hjá ÍF Føroyum.

Eftir tí, sum Sosialurin hevur frætt, vera allir leikararnir uttan ein við næsta ár og tí skuldi borið væl til at hildið fram við góða spælinum.

Næsta ár fáa skeptikararnir uttan iva rætt, tí tá verður tað munandi harðari at spæla í fyrstu deild enn tað er at spæla í aðru. Men, sum í øðrum ítróttargreinum, so mennast ítróttarfólk av kapping og tí er ikki óhugsandi, at teir enn einaferð fara at gera gjøldur við okkum skeptikarum.

Vit ynskja teimum góða eydnu í royndini ...

# Steypafinalurnar flyta dystirnar

*Flogbóltur: Fyri fyrstu ferð í óminniligar tíðir verða steypafinalur í flogbólti og í tí sambandi er seinasta umfar í landskappingini flutt fram*

Sveinur Tróndarson

Tað var í teimum góðu gomlu døgunum ...

Tað ljóðar sum eitt ævintýr og tað er ikki so langt frá, at tað er tað eisini, tí fyri fyrstu ferð í nógv, nógv harrans ár, verða leiktar steypafinalur í flogbólti.

Fyri nógvum árum síðani skipaði FBF fyri einari steypakapping, men hon datt niðurfyri. Í hennara stað kom ein vikuskiftiskapping, og tað er ikki ov nógv sagt, at ein partur av glansinum fór av flogbóltskappingini tá steypakappingin hvarv.

### Nú royna vit aftur ...

Nú verður so roynt aftur og um enn henda steypakappingin ikki er so drúgv, sum tann í fótbólti ella tann í hondbólti, so er tað rætt av flogbóltssambandinum at byrja aftur og tað er eisini rætt í fyrsta umfari at byrja í smáum.

Munurin millum deildirnar er so stórur, at tað leikliga hevði verið synd at latið t. d. fyrstu deild spælt saman við meistaradeildini, og tí er rætt at taka útgangsstøði í vikuskiftiskappingunum.

Men av tí, at henda steypakappingin ikki endaliga var fastløgd tá kappingin var løgd er samanfall millum dagin fyri steypakappingini og seinasta umfar í landskappingini og tí hevur FBF gjørt av at flyta dystirnar 18. marts fram.

### Fluttir fram

Dystirnir í kvinnudeildini verða báðir leiktir fríggjadagin 3. marts, meðan dystirnir í mansdeildini vera leiktir ávikavist 7. marts og 10. marts.

Hjá kvinnum merkir tað, at dysturin millum TB og Fleyr, sum sambært skránni eigur at vera leiktur í Havn 18. marts, verður leiktur í Trongisvági fríggjakvøldið 3. marts. Somuleiðis verður dysturin millum Dráttur og Mjølnir, sumstendur at verða leiktur 18. marts, leiktur fríggjakvøldið 3. marts. Hann verður leiktur á Giljanesi, sum tað stendur í skránni.

Hjá monnum standa Fleyr og ÍF at skula spæla í Havn 18. marts og SÍ og Mjølnir í Sørvági sama dag. Hesir dystir verða nú leiktir soleiðis, at Fleyr og ÍF spæla týskvøldið 7. marts í Gundadalshøllini, meðan SÍ og Mjølnir spæla í Sørvági fríggjakvøldið eftir, 10. marts.

### Meistararnir enda í Gundadali

Hesar fýra flytingar hava so við sær, at vikuskiftið 18. marts vera eingir aðrir dystir enn steypafinalan, sum verður leikt í Havn.

Harafturat hava flytingarnar eisini við sær, at seinasta umfar hjá báðum meistaraliðunum, Fleyr hjá monnum og Mjølnir hjá kvinnum, verða leikt í Havn tann 11. marts

Henda dagin hittast Fleyr og Mjølnir í báðum deildum og tað vil siga, at meistararnir vera kosnir í Gundadalshøllini leygardagin 11. marts.

Vikuskiftið eftir endar flogbóltsárið við steypafinalunum og tað kundi vallað funnist betri endi á árinum.